# Rækjuflotin

## Verandi støða og útlitini í nærmastu framtíð.



Frágreiðing frá nevnd, sett av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum

Apríl 2004

## Samandráttur og tilmæli

### Samandráttur

Fyri at lýsa støðuna og meta um framtíðarútlitini hjá rækjuflotanum hevur nevndin lagt høvuðsdent á at kanna veiðimøguleikar, marknaðarviðurskifti og roknskapartøl. Út frá hesum atlitum hevur verið roynt at lýst støðuna og framtíðarútlitini hjá rækjuflotanum.

Staðfest er, at hóast rúmar veiðimøguleikar, sum ikki verða gagnnýttir til fulnar, hevur ikki verið møguligt at fingið raksturin at bera seg. Sambært teimum upplýsingum nevndin hevur fingið, er ikki serliga sannlíkt, at Føroyar við samráðingum kunnu fáa týðandi betri og meir lønandi veiðimøguleikar í nærmastu framtíð.

Kanningarnar av marknaðarviðurskiftunum vísa, at útboðið av rækjum er støðugt hækkað seinastu árini. Hetta, saman við lágum dollarkursi og yenni og víkjandi búskapargongd í Europa og USA, hevur havt við sær, at prísurin á rækjum er lækkaður munandi seinastu árini. Alt týður uppá, at útboðið eisini verður stórt komandi árini og nærum ongi tekin eru um, at prísurin fer at hækka. Nærum onki bendir á nakran marknaðarbata næstu eitt til tvey árini. Staðfestað kurshækkingin á amerikanska dollaranum seinastu tíðina, fær tó óiva eina positiva ávirkan á prísin á kókaðum rækjum.

Roknskapartølini vísa, at gongdin hevur verið sera vánalig undanfarnu árini. Skipini hava havt rakstrarhall seinastu fýra árini og eginpeningurin er nógv minkaður. Útrokningarnar geva eina ábending um, hvussu og hvørji tiltøk kunnu setast í verk, herundir eisini, hvussu nógv marknaðarprísurin á rækjum má hækka fyri at fáa raksturin at javnviga við verandi veiðimøguleikum.

Ongar av útrokningunum benda á, at tað finnast loysnir, sum í fullan mun tryggja flotanum framhaldandi burðardyggar fíggjarligar karmar við verandi prísi á rækjum og verandi veiðimøguleikum hjá rækjuflotanum.

Tað hevur ikki verið møguligt at koma til eina tilráðing, sum allir partar í nevndini kundu semjast um. Tí hevur nevndin tvey tilmælir til loysnir. Annað tilmælið kann fleirtalið av nevndini taka undir við, meðan ein minniluti hevur sítt egna tilmæli. Meirilutin í nevndini er: Jørmann Petersen, Óli Jacobsen, Petur H. Jacobsen og Sjúrður Heinesen. Minnilutin er Hans Jákup Mikkelsen. Umboðini fyri grannskoðarafeløgini, Ole Guldborg Nielsen og Finnbjørn Zachariasen eru ikki partur av meiri – ella minniluta tilmælunum. Umboðið fyri Føroya Skipara- & Navigatørfelag, Eyðstein Djurhuus, hevur ikki luttikið í nevndararbeiðnum.

## Meiriluta tilmælið

Meirilutin mælir til at geva rækjuflotanum eina tíðaravmarkaða kreppuhjálp.

Mælt verður til at gera eina lóg, sum gevur flotanum eina avmarkaða kreppuhjálp, sum í mesta lagi inniber, at flotin fær eina afturbering, sum er ájavnt við skattin av útgoldnu hýrunum. Lógin skal vera galdandi í eitt avmarkað tíðarskeið upp á tvey ár frá tí, at hon verður sett í gildi.

Útrokningarnar vísa, at við vanligari veiðisamanseting hevur eitt miðal rækjuskip eitt hall áðrenn rentur og avskrivingar upp á umleið 2 mió kr. árliga. Ein hýruafturbering svarandi til 2 mió kr. árliga fær úrslit áðrenn rentur og avskrivingar at javnviga. Við verandi føroyska rækjuflota, verður kostnaðurin av einari slíkari loysn umleið 10 – 12 mió kr. árliga.

Hendan loysn verður tilmælt av meirilutanum, hóast útrokningarnar vísa, at hetta ikki er nóg mikið at tryggja framhaldandi burðardyggan rakstur við verandi rækjuprísi og veiðimøguleikum. Loysnin verður tilmælt, til tess at geva flotanum ein betri møguleika at yvirliva næstu tvey árini. Hetta verður tilmælt við atliti at tí møguligu príshækkan, sum avtalan um føroyskan limaskap í alevropeiska upprunaøkinum kann geva og saman við vónini um, at marknaðurin batnar innan eitt tvey ára skeið, soleiðis at flotin eftir hetta kann byggja sína tilveru á fíggjarliga burðardyggar karmar. Nevndin hevur tá eisini í huga aðalsetningin um varðveitan av einum fjølbroyttum flota, og at tey rættindi Føroyar hava, verða gagnnýtt.

Meirilutin er greiður yvir, at undir verandi umstøðum er hendan hjálp ikki nóg mikið til at tryggja eitt nøktandi fíggjarligt úrslit. Staðfestast kann, at skal flotin koma í gjøgnum hesi tvey árini, er neyðugt við vælvild frá lánveitarum og møguliga øðrum pørtum við. Um tað vísir seg, at ongir batar eru hendir, tá tvey ár eru liðin, er meirilutin samdur um, at flotin eftir hesa tíð má finna eina tillaging, sum byggir á vanligar marknaðar– og fíggjartreytir.

## Minniluta tilmælið

Minnilutin mælir til, at rækjuflotin tillagar seg teimum givnu fyritreytunum viðvíkjandi veiði- og marknaðarviðurskiftum.

Minnilutin kann ikki taka undir við meirilutanum, sum skjýtur upp at geva rækjuflotanum eina skattaafturbering. Minnilutin førir fram, at ein skattaafturbering er áleið 2 mió kr. pr. rækjuskip. Úrslitini í 2003 hjá skipunum vóru áleið 6 - 7 mió kr. í halli. Sostatt muna 2 mió kr. ov lítið. Ein skattaafturbering er tí eingin loysn. Ein skattaafturbering fær møguliga raksturin áðrenn rentur og avskrivingar at javnviga, men tað krevur, at peningastovnarnir geva bæði rentu- og avdráttarskáa í nøkur ár.

**Tilmæli frá eini samdari nevnd**

Ein samd nevnd tekur undir við, at:

- landsstýrið leggur størri orku í at skaffa rækjuflotanum meiri lønandi veiðimøguleikar
- landsstýrið játtar pening til at kanna nýggjar veiðimøguleikar fyri rækjur, og at ein arbeiðsbólkur verður settur við hesum endamáli
- nýggir veiðimøguleikar verða troyttir, har landsstýrið gevur fíggjarliga játtan til gransking, sum skal brúkast til royndarfiskiskap á nýggjum rækjuleiðum
- stuðul verður veittur einum rækjuskipi til royndarveiðu eftir rækjum undir Føroyum

# Innihaldsyvirlit


**1 INNGANGUR ..... 5**

**2 ÚTFLUTNINGUR OG SAMFELAGSÍSKOYTI ..... 6**

2.1 Útflutningur ..... 6
2.2 Samfelagsískoyti ..... 6

**3 VEIÐIMØGULEIKAR ..... 8**

3.1 Verandi støða ..... 8
3.2 Fiskiveiðiavtalur og umbýtiskvotur ..... 10

**4 MARKNAÐARSTØÐAN OG ÚTLITINI ..... 11**

4.1 Veiða av kaltvatnsrækjum ..... 12
4.2 Marknaður fyri kaltvatnsrækjur ..... 14
4.2.1 Pilkaðar rækjur ..... 15
4.2.2 Rækjur við skel ..... 16

**5 PRÍSIR ..... 16**

5.1 Ídnaðarrækjur ..... 17
5.2 Kókaðar rækjur og Japan rækjur ..... 18
5.3 Framtíðarútlit ..... 19

**6 ROKNSKAPARTØL ..... 20**

6.1 Alment ..... 20
6.2 Raksturin ..... 20
6.3 Fíggjarstøðan ..... 21
6.4 Gjaldføri ..... 22

**7 RAKSTURIN UNDIR YMISKUM FYRITREYTUM ..... 22**

7.1 Vanlig veiðisamanseting ..... 23
7.2 Umlagdur rakstur til ídnaðarrækjur og eina Eysturgrønlandskvotu ..... 25
7.3 Tvey skip undir Eysturgrønlandi ..... 27
7.4 Eitt skip undir Eysturgrønlandi ..... 28

**8 HÝRUR / HÝRUPROSENT ..... 29**

# 1 Inngangur

Ásannandi, at rækjuflotin hevur havt sera vánalig rakstrarúrslit seinastu árini, samstundis sum útlitini eru døpur, setti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eina nevnd at lýsa støðuna hjá rækjuvinnuni. Arbeiðssetningurin hjá nevndini hevur verið:

1) at útgreina verandi støðu hjá rækjuvinnuni
2) at meta um framtíðar veiði – og marknaðarviðurskiftir
3) at koma við uppskoti til eina loysn

Eftir fyrispurningi staðfesti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, at nevndin skuldi viðgera rækjuflotan.

Nevndin fór til verka miðskeiðis í mars mánaði og fekk umleið ein mánað at arbeiða í. Longu tá arbeiðið byrjaði, boðaðu umboðini fyri grannskoðarafyritøkurnar frá, at tey ikki vildu koma við uppskotum til loysnir, men at tey hinvegin vildu viðgera uppskotini.

Nevndin hevur í sínum arbeiði roynt at lýst verandi støðu hjá rækjuskipunum. Dentur hevur verið lagdur á at lýsa fíggjarligu gongdina og veiðimøguleikarnar. Hartil hevur nevndin lagt serligan dent á at kanna marknaðarviðurskiftini og hvørji útlitini í marknaðinum eru. Men eisini onnur viðurskifti, so sum møguleikin at betra um veiðimøguleikarnar gjøgnum samráðingar, hýruviðurskifti, umsiting av verandi kvotum v.m. hava verið viðgjørd.

Nevndin er mannað av:

Jørmann Petersen, Fiskimálaráðið, formaður
Hans Jákup Mikkelsen
Ole Guldborg Nielsen, Grannskoðari, Rasmussen & Weihe
Finnbjørn Zachariasen, Grannskoðari, KPMG
Petur H. Jacobsen, Felagið rækjuskip
Sjúrður Heinesen, Maskinmeistarfelagið
Eyðstein Djurhuus, Føroya Skipara- & Navigatørfelag
Óli Jacobsen, Føroya Fiskimannafelag

Símun Joensen Fiskimálaráðið, skrivari

# 2 Útflutningur og samfelagsískoyti

## 2.1 Útflutningur

Útflutningurin av rækjum var 221 mió kr. í 2003. Hetta svarar til 5,9 % av samlaða føroyska útflutninginum. Útflutningsvirðið av rækjum hevur verið rímiliga støðugt tey seinastu 10 árini og hevur ikki sveiggjað stórvegis. Í 2001 er tó eitt undantak, tí tá hækkaði virðið orsakað av keypi av kvotum. Útflutningsparturin er tó lækkaður. Orsøkin er, at samlaði útflutningurin er hækkaður. Útflutningsparturin fyri 10 árum síðani var góð 13%, men er støðugt lækkaður síðani og er nú knøpp 6%.

Vanliga verða rækjur býttar í trý, nevniliga Japanrækjur, kókaðar rækjur og ídnaðarrækjur. Niðanfyri er hetta býtið víst.

Talva 1. Býtið av útflutninginum fyri rækjur í 2003.

| | **Nøgd** | **Býtið** | **Útfl. virði** | **Útfl. virði pr. kg. rávøru** |
|---|---|---|---|---|
| Japan rækjur | 425 | 3% | 9.279 | 21,83 |
| Kókaðar rækjur | 5.993 | 39% | 100.505 | 16,77 |
| Ídnaðar rækjur | 9.029 | 58% | 111.629 | 12,36 |
| Tilsamans | 15.447 | 100% | 221.413 | 14,33 |

*Kelda: Hagstova Føroya. Frágreiðing: Ídnaðarrækju eru pilkaðar rækjur / 0,35 (0,35 er mett úrtøka)*

Sum talva 1 vísir, er størsti parturin av rækjunum ídnaðarrækjur. Ein partur er kókaðar rækjur og ein sera lítil partur er Japanrækjur. Japanrækjur hava besta prís, men hesin parturin er fallin sera nógv samstundis, sum prísurin er fallin.

Nøgdarsamansetingin av tí føroysku veiðuni er broytt tey seinastu árini. Parturin av Japanrækjum er minkaður. Meira enn helvtin av nøgdini er ídnaðarrækjur, sum eru pilkaðar á Oyri. Av hesum fara 80% til Stórabretlands. 39% eru kókaðar rækjur. Av hesum fara 83% til Danmarkar.

## 2.2 Samfelagsískoyti

KPMG gjørdi í juni 2003 eina uppgerð fyri Felagið Rækjuskip av, hvussu stórt ískoytið frá føroysku rækjuvinnuni var til samfelagsbúskapin í 2001 og 2002. Fyritreytirnar í uppgerðini vórðu valdar í samstarvi við Magna Laksafoss, búskaparfrøðing. Uppgerðin í 2002 bygdi á virksemið hjá 8 rækjuskipum og 2 feløgum, sum framleiddu burtur úr rækjum.

Í uppgerðini varð lagdur dentur á at lýsa, hvussu nógvar lønir vórðu útgoldnar til føroyingar av tí virksemi, sum beinleiðis og óbeinleiðis stavar frá rækjuvinnuni í

Føroyum. Uppgerðin fevndi eisini um almennar lønir, ið rækjuvinnan fíggjaði. Í talvu 2 er samlaða uppgerðin hjá KPMG endurgivin.

Talva 2: Lønir og ársverk, ið beinleiðis og óbeinleiðis stava frá rækjuvinnuni

| | 2002 | | 2001 | |
|---|---|---|---|---|
| | **Mió kr.** | **Ársverk** | **Mió kr.** | **Ársverk** |
| **Løn frá vinnuligum virksemi:** | | | | |
| Løn beinleiðis frá rækjuvinnuni | 82 | 276 | 86 | 276 |
| Løn frá beinleiðis veitingum til rækjuvinnuna | 35 | 173 | 39 | 184 |
| Løn frá avleiddum virksemi | 24 | 118 | 25 | 126 |
| Til samans frá vinnuligum virksemi | 141 | 567 | 150 | 586 |
| **Løn frá almennum virksemi:** | | | | |
| Løn frá almennum tænastum | 51 | 214 | 54 | 228 |
| Flytingar til pensionistar v.m. | 30 | 300 | 32 | 319 |
| Løn frá veitingum til tað almenna, íroknað multiplikatorávirkan | 31 | 153 | 33 | 162 |
| Til samans frá almennum virksemi | 112 | 667 | 119 | 709 |
| **Samlað løn og ársverk** | 253 | 1.234 | 269 | 1.295 |

*Kelda: KPMG*

Sambært uppgerðini vórðu umleið 141 mió kr. útgoldnar í lønum til føroyingar frá vinnuligum virksemi í 2002. Av hesi upphædd vórðu umleið 82 mió kr. útgoldnar til føroyingar, ið sigldu við føroyskum rækjuskipum og til føroyingar, ið framleiddu burtur úr rækjum á føroyskum virkjum. Harafturat høvdu beinleiðis veitingar til rækjuvinnuna við sær, at umleið 35 mió kr. vórðu útgoldnar í lønum. Hesar lønir vórðu útgoldnar av skipasmiðjum og øðrum fyritøkum, sum framdu ymiskt viðlíkahaldsarbeiði, virkjum ið gjørdu og viðlíkahildu fiskireiðskap, umframt av flutningsfyritøkum og øðrum tænastufyritøkum v.m. Løn frá avleiddum virksemi upp á umleið 24 mió kr. í 2002 var løn, ið stavar frá tí virksemi, sum nýtslan av omanfyrinevndu lønum viðførir.

Ein týðandi partur av lønini frá vinnuliga virkseminum fór til tað almenna (land og kommunur) sum skattur og avgjøld. Í uppgerðini hjá KPMG varð roknað við, at umleið 77 mió kr. av samlaðu lønunum upp á 141 mió kr. fóru til tað almenna í 2002.

KPMG nýtti sum fyritreyt, at tað almenna nýtir inntøkuna frá rækjuvinnuni í sama lutfalli, sum allar aðrar almennar inntøkur. Við hesi fyritreyt skapar nýtslan av almennu inntøkunum frá rækjuvinnuni ringvirkningar. KPMG roknar í uppgerðini við, at samlaða

inntøkan til tað almenna í 2002 var umleið 136 mió kr. og at nýtslan av hesi inntøku hevði við sær, at umleið 112 mió kr. vórðu útgoldnar í lønum. Av hesi upphædd vórðu umleið 51 mió kr. útgoldnar til alment lønt starvsfólk, meðan umleið 31 mió kr. vórðu útgoldnar til fólk sum veita tænastur til tað almenna og av avleiddum virksemi. Harafturat vórðu umleið 30 mió kr. nýttar til veitingar til pensionistar v.m.

Samanlagt vísir uppgerðin frá KPMG, at rækjuvinnan var grundarlag undir góðum 250 mió kr. í lønarútgjaldingum í 2002, svarandi til góð 1.200 ársverk, íroknað flytingar til pensionistar. Av samlaðu lønarútgjaldingunum vórðu 112 mió kr., svarandi til 667 ársverk treytað av almennari nýtslu.

Tá metast skal um, hvønn týdning rækjuvinnan hevur í dag skal havast í huga, at tað í dag eru færri skip í flotanum enn tað vóru í 2002. Harafturat broytast fyritreytirnar hjá framleiðsluvirkjum á landi væntandi frá 1. januar 2005. Eftir 1. januar 2005 kunnu føroysku virkini væntandi keypa rækjur frá øðrum enn teimum føroysku skipunum, uttan at skula rinda toll í sambandi við útflutning av liðugtvøruni. Somuleiðis kunnu tey føroysku skipini selja rækjur uttanlands á jøvnum føti við tey útlendsku skipini. Hetta var ikki møguligt í 2001 og 2002, og tí framleiddu virkini einans vørur úr rávøru keypt frá føroyskum skipum. Frá 1. januar 2005 verður sostatt møguligt hjá føroysku virkjunum at halda fram við framleiðsluni, hóast Føroyar ongan rækjuflota hava.

Lækkaða rækjuskipatalið og broyttu fyritreytirnar hjá virkjunum á landi minka væntandi munandi um ískoytið frá føroyska rækjuflotanum til samfelagsbúskapin. Nevndini kunnugt eru ikki gjørdar útrokningar av hvønn týdning rækjuskipini hava í dag og kunnu væntast at fáa eftir 1. januar 2005.

# 3 Veiðimøguleikar

## 3.1 Verandi støða

Veiðimøguleikarnir hjá rækjuskipunum eru í høvuðsheitum á trimum leiðum. Á Flemish Cap, Eysturgrønlandi og eystanfyri við Svalbard og í Barentshavinum. Nærri útgreining av veiðimøguleikunum er sett upp í talvu 3 niðanfyri.

Talva 3: Útgreining av veiðimøguleikum hjá rækjuskipum

| **Ár** | **3L** | **3M** | **Grønland** | **Svalbard** | **Barentshavið** |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Tons* | *Dagar* | *Tons* | *Dagar* | *Tons* |
| 1998 | 0 | 1606 | 1150 | 1317 | 3500 |
| 1999 | 0 | 1606 | 1150 | 1317 | 3200 |
| 2000 | 67 | 1606 | 1150 | 1317 | 2150 |
| 2001 | 67 | 1606 | 1150 | 1317 | 2100 |
| 2002 | 67 | 1606 | 1150 | 1317 | 2050 |
| 2003 | 144 (1344) | 1606 | 1150 | 1317 | 50 |
| 2004 | 144 | 1606 | 1150 | 1317 | 500 |

Í talvu 3 eru veiðimøguleikarnir í 3L[1] nevndir. Føroyar hava verið sera misnøgdar við umsitingina av kvotuni á hesum øki. Eftir avgerðum tiknar í NAFO hevur lutur Føroya á hesum øki verið sera avmarkaður undanfarnu árini.  Føroyar hava ikki verið og eru framvegis ikki nøgdar við tær avgerðir, sum eru tiknar í NAFO um býtið av kvotuni á hesari leið og Danmark hevur, vegna Føroyar og Grønland, mótmælt hesum. Limalond hava tá rætt til at seta egna kvotu. Hetta hevur Danmark gjørt, vegna Føroyar og Grønland. Samlaða rækjukvotan í 3L hækkaði í 2003. Kvotan sum Danmark, vegna Føroyar og Grønland, ásetti sær í 2003, var 1344 tons. Hesi rættindi vórðu tó ikki gagnnýtt í 2003. Danmark hevur, vegna Føroyar og Grønland, eisini mótmælt í 2004. Ongin avgerð er tikin um hvørja kvotu Danmark, vegna Føroyar og Grønland, skal áseta í 3L í 2004 og ongi fiskiloyvir eftir rækjum eru útskrivað til hetta økið higartil í 2004.

Nevndin hevur eisini hugt at, hvussu gagnnýtslan av veiðimøguleikunum hevur verið seinastu árini. Sum heild kann sigast, at veiðimøguleikarnir eru rúmligir. Øll seinastu árini eru veiðimøguleikarnir ikki vorðnir gagnnýttir til fulnar. Yvirlit yvir ikki nýttar møguleikar er víst í talvu 4.

Talva 4. Ikki nýttir veiðimøguleikar

| **Ár** | **3M** | **Eysturgrønland** | **Svalbard** | **Barentshavið** |
|---|---|---|---|---|
| | *Dagar* | *Tons* | *Dagar* | *Tons* |
| 1998 | 314 | 70 | 903 | 3286 |
| 1999 | 555 | - | 808 | 2321 |
| 2000 | 672 | 93 | 843 | 1290 |
| 2001 | 173 | 18 | 882 | 2035 |
| 2002 | 560 | 41 | 712 | 1861 |
| 2003 | 196 | 71 | 1239 | 50 |

Nógvar orsøkir kunnu vera til at kvoturnar ikki verða gagnnýttar. Sum sæst hevur flotin í størstan mun lagt seg eftir at gagnnýta møguleikarnar á Flemish Cap og við Eysturgrønland. Nærliggjandi er at hugsa sær, at orsøkin til hetta kundi verið betri lønsemi á hesum leiðunum. Nevndin metir tað vera óheppi, at fiskirættindi liggja eftir ónýtt, serstakliga í Eysturgrønlandi, tí rækjurnar har hava serliga stórt virði. Ein samd nevnd mælir til, at funnin verður ein loysn, sum ger, at kvoturættindini við Eysturgrønland verða troytt í so stóran mun sum til ber.

Bert brotpartar av møguleikunum við Svalbard og í Barentshavinum hava verið nýttir. Fleiri dømir eru tó um skip, sum eru komin í flotan við tí fyritreyt, at tey í størstan mun skuldu byggja sítt tilverugrundarlag á hesar møguleikar. Royndirnar hava verið vánaligar, raksturin hevur ikki borið seg og skipini eru farin úr aftur flotanum. Hetta gevur grundarlag fyri at siga, at hóast veiðimøguleikarnir tykjast rúmir, so kann staðfestast, at tað á teimum leiðum Føroyar hava rættindi at fiska rækjur, ikki kunnu fiskast tær nøgdir av rækjum, sum við verandi prísi gevur grundarlag fyri lønandi rækjuvinnu.

[1] Føroysk skip hava fiskað rækjur á tveimum økjum í NAFO skipanarøkinum. Fiskað verður í 3M, sum er á Fl. Cap og í 3L, sum er øki á Grand Bank.

Ein møgulig gongd leið er tí, at Føroyar við samráðingum royna at útvega flotanum atgongd til leiðir, sum geva grundarlag fyri meir lønandi rækjufiskiskapi. Havast skal eisini í huga, at føroyski rækjuflotin kappast við rækjuflotar úr øðrum londum, sum selja sínar rækjur á sama marknað, men sum hava munandi betri veiðimøguleikar. Hetta inniber sjálvsagt eina verri kappingarstøðu fyri føroyska rækjuflotan.

## 3.2 Fiskiveiðiavtalur og umbýtiskvotur

Føroyar útvega partvís veiðimøguleikar á fjarleiðum ígøgnum fiskiveiðiavtalur, har Føroyar lata fisk av egnum grunnum fyri fisk av øðrum grunnum. Fiskirættindi, sum á henda hátt verða fingin til vegar, verða síðani býtt út á ella nýtt av ymsu skipabólkunum.

Seinastu tíðina hava umboð fyri rækjuflotan ført fram, at rækjuskipini fáa ein alt ov lítlan part av teimum veiðimøguleikum, sum Føroyar útvega sær við samráðingum. Eisini hevur verið ført fram, at rækjuflotin er fyri vanbýti tá umræður fiskiveiðiavtalur við onnur lond. Rækjuvinnan hevur ført fram, at Føroyar í samráðingum eiga at útvega rúmari ræsur til rækjuflotan á leiðum, har útlit eru fyri meir lønandi rakstri. Nevndin er tó sjálvsagt vitandi um, at fiskiveiðisamráðingar mangan eru truplar, og at tað ofta tykist trupult at gera tær stóru broytingarnar í ymisku sáttmálunum, umframt, at nógv onnur atlit eisini skulu takast.

Nevndin hevur havt fund við umboð fyri Løgmansskrivstovuna fyri at fáa greiðu á, um tað ikki er møguligt gjøgnum samráðingar at útvega rækjuflotanum meir lønandi veiðimøguleikar. Sagt verður, at hetta er roynt í fleiri samráðingum, men at tað tykist sera trupult at fáa bøtt um veiðimøguleikarnar. Spurt varð eisini um støðuna í 3 L, sum kundi hugsast at bøtt nakað um útlitini hjá vinnuni, men eisini fyri ta leiðina verður mett, at tað er trupult og kemur at taka tíð at fáa eina loysn, sum Føroyar kunnu góðtaka.

Sum talva 4 vísir, verða ikki allir veiðimøguleikar nýttir. Samstundis kann tó staðfestast, at raksturin hjá skipunum hongur als ikki saman (talva 9). Fleiri orsøkir eru til vánaligu rakstarúrslitini seinastu árini, men ein orsøk, sum verður nevnd er, at veiðan hjá føroysku skipunum pr. fiskidag er lág, serliga um sammett verður við veiðuna hjá grønlendskum og kanadiskum rækjuskipum. Frægasta veiðan pr. fiskidag hevur seinastu árini verið á Flemish Cap á øki 3M, har veiðan hevur verið millum 8 og 9 tons pr. dag. Veiðan við Svalbard hevur verið umleið 6 tons pr. fiskidag, meðan veiðan við Eysturgrønland hevur ligið um góð 3 tons. Til samanberingar kann nevnast, at í Vesturgrønlandi og Kanada er møguligt at veiða gott 3 ferðir so nógv pr. dag.

# 4 Marknaðarstøðan og útlitini

Heimsframleiðslan av rækjum er 4,2 mió tons. Heimsframleiðslan er hækkað úr 1,5 milliónum tonsum fyri 20 árum síðani til 4,2 milliónir tons í dag. Kaltvatnsrækjan er á leið 8% av samlaða útboðnum av rækjum. Asia er størsti útvegari av rækjum. Býtið er soleiðis, at 73% kemur úr Asia, 10% úr Latín Amerika, 8% úr Europa, 6% úr Norður Amerika og 3% úr Afrika.

Mynd 1. Uppbýti av, hvar í heiminum rækjur verða veiddar og aldar.




Býtið ímillum veiddar og aldar rækjur er, at 2,8 mió rækjur eru veiddar og 1,2 mió tons eru aldar, t.v.s. at á leið 70% av rækjunum eru veiddar. Fyri nøkrum árum síðani varð mett, at aldar rækjur fóru at økja nógv um útboðið, og hava stóra ávirkan á heimsútboðið. Hendan meting hevur ikki hildið. Vøksturin hevur verið í veiddum rækjum ístaðin. Hetta, saman við sjúkutrupulleikum í alingini av rækjum, hevur ført við sær, at býtið millum aldar og veiddar rækjur hevur verið støðugt.

Serliga í Kina er stórur vøkstur í framleiðsluni av heittvatnsrækjum. Meginparturin av framleiðsluni í Kina verður nýttur av kinverjum. Sostatt verða hesar rækjur ikki útbodnar á altjóða marknaðinum. Samlaða útboðið á altjóða marknaðinum er mett at vera áleið 1,4 mió tons. Hetta merkir, at veiðan av kaltvatnsrækjum er 28% av samlaða altjóða útboðnum av rækjum.

Teir størstu marknaðirnir fyri rækjur eru ES, USA og Japan. Hesir marknaðir innflyta góð 1.3 mió tons av rækjum. Sostatt eru hesir marknaðir altavgerandi fyri gongdina í

rækjuvinnuni. Eftirspurningurin á marknaðinum í USA er øktur heilt nógv. ES er størsti marknaður fyri rækjur og er eisini í vøkstri.

## 4.1 Veiða av kaltvatnsrækjum

Høvuðsveiðilondini av kaltvatnsrækjum eru Kanada, Grønland, Ísland, Norra, Danmark og Føroyar. Veiðan hjá Danmark er sera lítil, men Danmark er ein stórur umpakkari av rækjum. Samstundis fer meginparturin av handlinum av rækjunum úr Grønlandi, Norra og Føroyum yvir Danmark. Føroyar hava millum lítla og onga nøgd av rækjum í egnum sjógvi. Tann føroyski flotin byggir sostatt sín tilverurætt á veiðu í fremmandum sjógvi, serliga Flemish Cap og Eysturgrønlandi. Samlaða veiðan av kaltvatnsrækjum er víst í talvu 5 og mynd 2 niðanfyri.

Talva 5. Samlað veiða av kaltvatnsrækjum. Í 1.000 tonsum

| **Lond/ár** | **‘85** | **‘86** | **‘87** | **‘88** | **‘89** | **‘90** | **‘91** | **‘92** | **‘93** | **‘94** | **‘95** | **‘96** | **‘97** | **‘98** | **‘99** | **‘00** | **‘01** | **‘02** | **‘03 E** | **‘04 E** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ísland | 25 | 36 | 39 | 30 | 27 | 30 | 38 | 47 | 56 | 75 | 84 | 90 | 83 | 63 | 43 | 32 | 31 | 38 | 36 | 36 |
| Grønland | 54 | 64 | 65 | 60 | 63 | 73 | 73 | 82 | 64 | 64 | 59 | 55 | 64 | 67 | 71 | 77 | 81 | 81 | 95 | 130 |
| Norra | 91 | 57 | 42 | 42 | 56 | 63 | 49 | 49 | 49 | 38 | 39 | 42 | 42 | 56 | 64 | 79 | 50 | 53 | 52 | 50 |
| Føroyar | 12 | 9 | 10 | 16 | 14 | 11 | 13 | 10 | 12 | 9 | 9 | 11 | 11 | 13 | 15 | 12 | 16 | 18 | 12 | 9 |
| Danmark | 10 | 11 | 16 | 8 | 8 | 6 | 6 | 8 | 6 | 4 | 8 | 9 | 9 | 8 | 5 | 6 | 6 | 6 | 6 | 6 |
| Kanada | 13 | 15 | 24 | 38 | 44 | 37 | 40 | 39 | 43 | 49 | 55 | 56 | 77 | 108 | 116 | 130 | 123 | 147 | 141 | 140 |
| Russland | 33 | 11 | 11 | 13 | 14 | 22 | 27 | 23 | 25 | 9 | 9 | 13 | 5 | 10 | 17 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 |
| Baltikum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | 0 | 0 | 2 | 4 | 6 | 8 | 12 | 20 | 19 | 19 | 19 | 19 | 19 |
| Onnur | 10 | 8 | 9 | 7 | 7 | 10 | 6 | 6 | 8 | 7 | 12 | 17 | 12 | 10 | 11 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 |
| Tilsamans | 248 | 211 | 216 | 214 | 233 | 252 | 256 | 264 | 263 | 257 | 279 | 299 | 311 | 347 | 362 | 385 | 356 | 392 | 391 | 420 |
| Broyting | - | -15% | 2% | -1% | 9% | 8% | 2% | 3% | 0% | -2% | 9% | 7% | 4% | 12% | 4% | 6% | -8% | 10% | 0% | 7% |

Kelda: Per Henning Meløy og Dr. Peter Hunt, Nordic Prawn meeting, Brussels, April 22, 2002. The Coldwater Prawn Forum 9 october 2003.

Mynd 2. Samlaða veiðan av kaltvatnsrækjum. 1.000 tons.




Kelda: Per Henning Meløy og Dr. Peter Hunt, Nordic Prawn meeting, Brussels, April 22, 2002. The Coldwater Prawn Forum 9 october 2003

Talva 5 og mynd 2 vísa, at veiðan av kaltvatnsrækjum er vaksin støðugt tey seinastu 20 árini. Rækjustovnurin í Barentshavinum var stórur miðskeiðis í áttatiárunum og norska veiðan var stór tá. Men síðani minkaði norska veiðan og hevur seinastu árini verið umleið 50.000 tons.

Íslendska veiðan var stór í 90unum, men síðani er veiðan minkað. Veiðan í teimum Baltisku londunum er økt seinastu árini. Orsøkin til hetta er, at íslendsk rækjuskip hava flaggað út til Baltisku londini. Tann størsta veiðiøkingin hetta tíðarskeiðið er í Kanada. Kanada hevur trýfaldað veiðuna uppá 9 ár. Eisini er øking í veiðuni á Flemish Cap.

Grønland hevur havt eina støðuga veiðu, men í ár verður stór øking í veiðuni við Grønland. Tó eru ábendingar um, at økingin í kvotunum í Grønlandi bert er ein kompensatión fyri, at yvirvektin verður íroknað kvotuna. Um so er, verður útboðið ikki størri enn í fjør. Sostatt vil samlaða útboðið ikki økjast, tí øll onnur lond hava eina støðuga veiðu. Tó kann roknast við, at nú talið á føroyskum rækjuskipum er fækkað, er sannlíkt, at samlaða føroyska veiðan kemur at lækka.

Veiðibýtið er víst í mynd 3. Tað vísir, at Kanada og Grønland veiða næstan tveir triðingar av samlaðu veiðuni av kaltvatnsrækjum. Síðani koma Norra og Ísland við ávikavist 12% og 9%. Føroyar veiða bert 2% av samlaðu veiðuni av kaltvatnsrækjum.

Mynd 3. Veiðibýti av kaltvatnsrækjum millum lond




## 4.2 Marknaður fyri kaltvatnsrækjur

Marknaðurin fyri kaltvatnsrækjur kann býtast upp eftir pilkaðum rækjum og rækjum við skel (skalrækjum). Hann kann eisini býtast eftir stødd av rækjum. Størstu rárækjurnar fara til Japans. Miðalstøddirnar verða kókaðar og fara einamest til Frankaríki, Svøríki, Kina og Russlands. Tær minstu støddirnar vera pilkaðar á pilkivirkjum í veiðilondunum og verða síðan seldar á marknaðin - eina mest til Stórabretlands.

### 4.2.1 Pilkaðar rækjur

Í talvu 6 niðanfyri er býtið av søluni av pilkaðum rækjum fyri árið 2003 víst.

Talva 6. Býtið av søluni av pilkaðum rækjum 2003

| | Kanada | Føroyar | Ísland | Norra | Royal Greenland | Tilsamans | Býtið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stórabretland | 2.544 | 2.200 | 19.200 | 4.500 | 4.500 | 32.944 | 40% |
| Danmark | 4.242 | 390 | 3.300 | 1.800 | 4.000 | 13.732 | 17% |
| Týskland | 404 | 60 | 1.500 | 300 | 1.000 | 3.264 | 4% |
| Frankaríki | 22 | 300 | 400 | 500 | 150 | 1.372 | 2% |
| Italia | 0 | 0 | 100 | 0 | 200 | 300 | 0% |
| Svøríki | 386 | 0 | 40 | 5.000 | 600 | 6.026 | 7% |
| Finland | 0 | 0 | 30 | 2.000 | 150 | 2.180 | 3% |
| Kanada | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0% |
| USA | 9.938 | 0 | 170 | 0 | 0 | 10.108 | 12% |
| Norra | 1.376 | 0 | 170 | 0 | 0 | 1.546 | 2% |
| Onnur | 408 | 50 | 1.690 | 900 | 1.400 | 4.448 | 5% |
| Tilsamans | 19.320 | 3.000 | 26.600 | 15.000 | 12.000 | 75.920 | 92% |
| Heimamarknaður | 4.500 | 20 | 350 | 2.000 | 0 | 6.870 | 8% |
| Tilsamans | 23.820 | 3.020 | 26.950 | 17.000 | 12.000 | 82.790 | 100% |

Kelda: Faroe Seafood

Talva 6 vísir, at Stórabretland er nógv tann størsti marknaðurin fyri pilkaðar rækjur. Síðani koma danski og amerikanski marknaðurin, sum eru ávikavist 17 og 12 %. Talan er helst um eina yvirmeting av danska marknaðinum, tí hetta er neyvan tað, sum verður nýtt av rækjum í Danmark. Ein partur verður mest sannlíkt seldur víðari. USA er 12% og næstan alt kemur úr Kanada. Svøríki er eisini ein stórur marknaður. Har er Norra nógv tann størsti útvegarin. Ísland er størsti útflytari til Stórabretlands og hevur væl meira enn helvtina av marknaðinum. Føroyar hava áleið 6% av marknaðinum í Stórabretlandi, meðan Grønland og Norra hava tað dupulta. Størstu framleiðarar av pilkaðum rækjum eru Ísland og Kanada. Síðani koma Norra og Grønland.

Ein orsøk til, at Ísland hevur so mikið stóran marknaðarpart í Bretlandi er, at Ísland hevur fría marknaðaratgongd til ES. Sjálvt um Kanada er ein stórur framleiðari, hevur Kanada lítlan marknaðarpart í Stórabretlandi. Orsøkin er, at Kanada skal gjalda 6% í tolli fyri tey fyrstu 5.000 tonsini og síðani 20% fyri alt sum er omanfyri 5.000 tons.

Orsøkin til, at Ísland pilkar so nógv í mun til egna veiðu er, at Ísland innflytir rávøru úr Norra til pilkingar. Orsøkin til, at hetta ber til er, at Norra hevur toll til ES, meðan Ísland ikki hevur. Norra skal gjalda 7,5% toll fyri alla nøgd omanfyri 5.000 tons. Føroyski útflutningurin til ES er eisini avmarkaður av einum kvotulofti. Grønland hevur fría atgongd á ES marknaðin fyri sínar rækjur.

### 4.2.2 Rækjur við skel

Ein stórur partur av rækjunum verður seldur sum rækjur við skel. Býtið av søluni er víst í talvu 7 niðanfyri.

Talva 7. Søla av rækjum við skel, býtt á marknaðir.

| 2002 | Kina | Japan | Russland | Svøríki | Frankaríki | Thailand | Tilsamans | Býtið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Island | - | 1.130 | - | 16 | 468 | 415 | 2.029 | 2% |
| Norra | 169 | 850 | 26 | 1.834 | - | 2 | 2.881 | 3% |
| Kanada | 16.665 | 9.638 | 1.056 | 11 | 48 | 2.076 | 29.494 | 28% |
| Grønland | - | 8.489 | - | - | - | - | 8.489 | 8% |
| Danmark | 18.703 | - | 13.261 | 11.036 | 7.022 | 3.772 | 53.794 | 51% |
| Russland | - | 8.961 | - | - | - | - | 8.961 | 8% |
| Føroyar | - | - | - | - | - | - | - | 0% |
| Onnur | - | 725 | - | - | 99 | - | 824 | 1% |
| Tilsamans | 35.537 | 29.793 | 14.343 | 12.897 | 7.637 | 6.265 | 106.472 | 100% |
| Býtið | 33% | 28% | 13% | 12% | 7% | 6% | 100% | |

Kelda: exportudvalget for fisk

Størsta útflytaralandið er Danmark, sum selir helvtina av heimsframleiðsluni. Orsøkin er hon, at Danmark selir alt fyri Grønland uttan søluna til Japans, alt fyri Føroyar og ein stóran part fyri Norra, Kanada og Ísland.

Ísland selir rættiliga lítið av rækjum við skel, tí nógv tann størsta nøgdin verður pilkað. Russland selir ein stóran part til Japans og eru hetta stórar rækjur úr Okhotska havinum, sum hava verið seldar á japanska marknaðinum í eina tíð. Hetta hevur ført við sær lægri prís á japanska marknaðinum. Alt í alt eru bara tveir útbjóðarar av rækjum við skel, nevniliga Danmark og Kanada.

Kina og Japan eru teir størstu marknaðirnir fyri rækjur við skel. Danmark og Kanada býta tann kinesiska marknaðin ímillum sín. Øll lond selja tær størstu rækjurnar til Japans, tí har er frægast prísur. Síðani selir Danmark rættiliga fitt til Svøríki, Frankaríki og Thailand. Allir marknaðir keypa kókaðar rækjur uttan Japan.

# 5 Prísir

Prísurin á rækjum er ávirkaður av nógvum ymiskum viðurskiftum. Nevnast kunnu búskaparliga gongdin í keyparalondunum, útboðið, eftirspurningurin av rækjum, gjaldoyrakursir og onnur viðurskifti. Hartil er støddarbýti eisini avgerandi fyri prísin. Størri rækjurnar eru, betri er prísurin. Rækjur vera býttar í (i) rárækjur ella Japanrækjur, sum eru tær størstu, (ii) kókaðar rækjur, sum eru miðalstórar og (iii) ídnaðarrækjur, sum eru tær smáu rækjurnar.

## 5.1 Ídnaðarrækjur

Á Flemish Cap og við Svalbard, har føroysku skipini hava veiðirættindi, eru rækjurnar smáfallandi. Vanligt býti er, at umleið helvt um helvt er ídnaðarrækjur og kókaðar rækjur. Tí er nærliggjandi at hyggja eftir prísgongdini fyri ídnaðarrækjur. Hetta eru tær rækjur sum verða pilkaðar.

Mynd 4 niðanfyri vísir prísgongdina á føroyskum ídnaðarrækjum og føroyskum pilkaðum rækjum.

Mynd 4. Prísir á føroyskum ídnaðarrækjum og pilkaðum rækjum




Kelda: Rækjuvirkið á Oyri

Mynd 4 vísir, sum eisini roknast má við, at liðugtvøru- og rávøruprísirnir fyri ídnaðarrækjur fylgjast. Prísirnir hava sveiggjað nakað tey síðstu 14 árini. Prísurin gjørdi eitt rend upp í 1995 fyri síðani at fella aftur í 1996 og 1997. Annars hava prísirnir síðani 1991 verið støðugir og um tær 10 krónurnar fyri kilo. Síðani 2000 hevur prísurin verið støðugt fallandi og er nú millum 7 og 8 kr./kg.

Liðugtvøruprísurin hevur fylgt rávøruprísinum. Prísurin í 2001 var omanfyri 40 kr./kg. Men síðani er prísurin bara fallin, og í dag er hann á leið 34 kr./kg. Ábendingar úr Stórabretlandi siga, at prísurin er undir trýsti. Innflytarar bera nevniliga ótta fyri, at prísurin fer at fella seinni í ár orsakað av størri útboði. Prísirnir bæði fyri ídnaðarrækjur og pilkaðar rækjur eru falnir við 30% síðani ár 2000.

Mynd 5 niðanfyri vísir rávøruprísin í mun til samlaðu veiðuna av kaltvatnsrækjum. Hetta er sett upp fyri at síggja, um vaksandi útboð hevur við sær lægri prís.

Mynd 5. Prísir á føroyskum ídnaðarrækjum og samlaða veiðan av kaltvatnsrækjum




Mynd 5 vísir, at útboðið var støðugt frá 1991 til 1993. Síðani fall útboðið eitt vet í 1994, sum kanska var orsøkin til, at prísurin hækkaði í 1994-95. Síðani vaks útboðið og prísurin fall.

Hinvegin vaks útboðið frá 1997 til 2000, meðan prísirnir vóru rímiliga góðir. Útboðið í 2001 fall, samtíðis sum prísurin eisini fall. Nøgdirnar eru bara hækkaðar síðani 2001, og prísurin hevur verið undir støðugum trýsti.

Lækkandi prísir á marknaðinum, hava sjálvsagt endurspeglað seg í tí prísi, føroysku rækjuskipini hava fingið fyri sínar rækjur. Ábendingar eru tó um, at prísurin sum íslendsk og norsk skip fáa í løtuni, er nakað omanfyri tann prís, sum føroysku skipini fáa.

## 5.2 Kókaðar rækjur og Japan rækjur

Sølan av kókaðum rækjum er 77.000 tons, harav Kina innflytir 43% og Russland 19%. Svøríki keypir 17% og Frankaríki 10%. Stórar vónir hava verið settar Kina og Russlandi, sum væntandi fóru at keypa væl av rækjum, men tað vísir seg at vera torført at økja um søluna, uttan at prísurin fellur. Tann størsti parturin av veiðuni og harvið av kókaðu rækjunum er støddin 90-120, og tí gevur prísurin á hesari støddini eina sera góða ábending um, hvør miðalprísurin fyri rækjur er.

Kina hevur keypt hesa stødd fyri rímiliga høgar prísir, men nú eru prísirnir lækkaðir, úr ávikavist 20 niður í 14 og úr 17 niður í 12 kr./kg alt eftir miðaltali pr. kg. Hetta merkir eitt fall uppá umleið 30%. Prísirnir fyri tær minnu rækjurnar eru eisini falnir. Støddin 120-150 er fallin úr 12,50 kr./kg niður í 9,50 kr./kg og støddin 150-180 úr 11 niður í 8 kr./kg.

Stórar vónir vórðu settar Russlandi, sum hevur keypt nógvar rækjur, men orsøkin er helst hon, at prísirnir eru lágir. Russland er nevniliga ein lágprísmarknaður, og prísirnir liggja tí ímillum 9 og 13 kr./kg alt eftir stødd. Sostatt skal ikki roknast við, at prísurin í Russlandi fer at lyfta sær á. Russland gevst nevniliga at keypa, tá ið prísirnir hækka. Sostatt eru tað tríggir marknaðir, sum kunnu keypa kókaðar rækjur til ein rímiligan prís, nevniliga Kina, Svøríki og Frankaríki, men so leingi útboðið stendur við og økist, eru eingi tekin um, at prísurin hækkar.

Prísirnir fyri tær stóru rækjurnar til Japans eru eisini lækkaðir. Orsøkin er einamest hon, at stórt útboð er av stórum rækjum úr tí Okhotska havinum. Eisini eru nøgdirnar úr Kanada og Grønlandi øktar. Prísirnir fyri støddina 50-70 er fallin niður á góðar 40 kr./kg og fyri 70-90 er prísurin bert 22 kr./kg. Ein miðalprísur fyri ein túr av Japan rækjum er góðar 30 kr./kg. Fyri nøkrum fáum árum síðani var prísurin millum 100 - 150 kr./kg.

Talva 8. Prísir fyri kókaðar rækjur og Japan rækjur

| Stødd | jan-03 | feb-04 | Broyting |
|---|---|---|---|
| 50-70 | 50 | 44 | -12% |
| 70-90 | 30 | 22 | -27% |
| 90-120 | 20 | 14 | -30% |
| 90-120 | 17 | 10 | -41% |
| 120-150 | 12 | 9 | -25% |
| 150-180 | 11 | 8 | -27% |

Kelda: Kangamiut

Nevndin hevur roynt at samanborið prísir og veiðisamanseting hjá føroyska og grønlendska rækjuflotanum. Sum heild kann sigast, at prísurin sum tey grønlendsku skipini fáa er lægri enn prísurin, sum føroysku skipini fáa. Hinvegin verður hetta meir enn uppvigað við tað, at tey grønlendsku skipini fiska munandi størri nøgdir. Hetta merkir, at grønlendski flotin er í eini betri kappingarstøðu, samanborið við tann føroyska flotan.

## 5.3 Framtíðarútlit

Nevndin hevur - umframt at lýst marknaðin - eisini roynt at fáa innlit í, hvussu marknaðarútlitini eru komandi eitt til tvey árini. Framleiðslan av rækjum er ov stór í mun til eftirspurningin. Hartil hava lágir kursir í Japan og á dollaranum, eisini ávirkað skeiva vegin. Seinastu tíðina er dollarin tó hækkaður í mun til donsku krónuna, og fær hetta uttan iva eina positiva ávirkan á prísin á kókaðum rækjum. Høga útboðið ger tað hinvegin ringt at síggja nøkur tekin um, at marknaðarstøðan batnar tey fyrstu eitt til tvey árini.

Tá hetta er sagt skal eisini nevnast, at nevndin hevur fingið upplýst, at Føroyar frá umleið 1. jan 2005 gerast limur í alevropeiska upprunaøkinum. Hetta inniber, at m.a. norsk og íslendsk virkir kunnu virka føroyskar rækjur og selja hesar á ES marknaðin, uttan at gjalda toll. Hinvegin merkir tað eisini, at føroysk virkir kunnu virka rækjur frá skipum úr ES limalondum, londum sum hava søkt um ES limaskap og frá londunum, sum hava EBS avtalu. Rækjurnar kunnu seljast á ES marknaðin uttan toll. Mett verður, at hetta møguliga kann hava við sær, at føroysk skip kunnu fáa hægri prís fyri sínar ídnaðarrækjur. Við verandi fyritreytum kann hetta merkja eina príshækking á rækjum til pilkingar á umleið 1- 1,5 kr./kg. Hesum er tó sera stór óvissa knýtt at.

# 6 Roknskapartøl

## 6.1 Alment

Til tess at lýsa fíggjarligu støðuna hjá rækjuflotanum, hevur nevndin kannað roknskapirnar hjá rækjuskipunum seinastu árini. Sum flestum kunnugt er talið av rækjuskipum fækkað. Hetta ávirkar eisini talið av skipum, sum eru við í uppgerðini. Átta skip eru í yvirlitinum í 1999, 2000 og 2001. Í 2002 er talið lækkað niður í 6 skip og í 2003 eru bert fýra skip við í yvirlitinum.

Av teimum 8 skipunum í 2001 eru tó 6 eftir. Havborg (gamla South Island) var ikki í rakstri í 2003 og fór ikki í rakstur fyrr enn í 2004. Kappin fór aftur til fiskiskap í mai 2003, men er longu lagdur aftur í 2004. Tí kann sigast, at 4 skip hava havt “vanligan” rakstur í 2003. Gjørt verður tí vart við, at talið av skipum, sum eru við í uppgerðini, ikki er tað sama sum tal av skipum í flotanum einstøku árini.

Tey fýra skipini sum eru við í yvirlitinum fyri 2003 eru Sólborg, Napoleon, Høgifossur og Arctic Viking.

## 6.2 Raksturin

Í talvu 9 eru miðaltølini fyri rækjuskipini sett upp. Raksturin hevur verið sera vánaligur seinastu árini. Í 1999 høvdu skipini eitt gott ár og miðalársúrslitið var góðar 4,5 mió kr. í avlopi. Síðani eru ársúrslitini versnaði ár undan ári og skipini hava seinastu árini havt hall. Hallið var í 2000 745 tkr. í miðal pr skip og er økt hvørt ár síðani. Í 2003 var miðalársúrslitið kr. 6,7 mió kr. í halli. Hetta hevur havt við sær, at eginpeningurin er munandi minkaður.

Talva 9. Miðalrakstrartøl fyri rækjuskip 1999 – 2003.

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Netto søla | 30.272 | 25.200 | 31.757 | 25.712 | 26.083 |
| Úrslit áðr. Rentur og avskr. | 4.713 | 2.238 | 1.430 | 1.428 | -2.741 |
| Avskrivingar | -2.411 | -3.010 | -4.005 | -4.467 | -4.690 |
| Fíggjar postar | -1.727 | -1.073 | -1.097 | -2.186 | -820 |
| Skattur og óvanligt | 4.005 | 1.100 | 2.413 | 1.626 | 1.557 |
| **Ársúrslit** | **4.580** | **-745** | **-1.259** | **-3.599** | **-6.694** |

Tølini viðvíkjandi 2003 stava frá fyribilsroknskapum hjá feløgunum.

Niðanfyri er sett upp ein talva, sum bara umfatar skipini Sólborg, Høgafoss, Arctic Viking og Napoleon/Ocean Castle fyri árini 1999-2003. Tølini vísa úrslit áðrenn rentur og avskrivingar.

Talva 10. Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar 1999-2003.

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Sólborg | 3.794 | 641 | 5.932 | -4.243 | -5.679 |
| Høgifossur | 8.095 | -761 | -203 | 4.264 | 90 |
| Arctic Viking | 9.471 | 3.761 | 5.944 | 2.160 | -1.950 |
| Napoleon | 8.791 | 2.144 | -1.777 | -2.523 | -3.423 |
| **Meðal** | **7.538** | **1.446** | **2.474** | **-86** | **-2.741** |

Talva 10 omanfyri vísir, at úrslitini áðrenn rentur og avskrivingar hjá teimum einstøku skipunum eru ymisk einstøku árini. Frágreiðingarnar til hesi sveiggj eru nógvar. Orsøkin kann vera, at skip missa trolreiðskapin, eyka viðlíkahald v.m. Verður tikið saman um kann sigast, at gongdin er tann, at úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar er versnað fyri tíðarskeiðið hugt verður eftir.

Sostatt kann metast, at við verandi veiðu- og marknaðarviðurskiftum er støðan tann, at fyri eitt miðal skip vanta í 2003 áleið 2 mió kr. í, til raksturin, áðrenn rentur og avskrivingar, javnvigar.

## 6.3 Fíggjarstøðan

Í 2003 kann fíggjarstøðan fyri tey 4 skipini, sum eru við í yvirlitinum lýsast soleiðis.

- Eginognin hjá Arctic Viking er áleið null og skipið er bókað til áleið 26 mió kr.

- Eginognin hjá Høgafossi er áleið 1,5 mió kr. og skipið er bókað til áleið 28 mió kr.
- Eginognin hjá Napoleon er áleið 14 mió kr., og skipið er bókað til áleið 57 mió kr.
- Viðvíkjandi Sólborg skal nevnast, at roknskapurin hjá P/F Ísborg, sum eigur Sólborg, er ein koncernroknskapur, sum eisini umfatar nótaskipið Krúnborg. Eginognin hjá P/F Ísborg, sum umfatar bæði rækjuvinnu og nótafiskiskap, er áleið 52 mió kr. Verður Krúnborg og harvið nótafiskiskapurin hildin uttanfyri, er eginognin áleið 7 mió kr., og Sólborg bókað til áleið 32 mió kr.

## 6.4 Gjaldføri

Roknskapirnir hjá feløgunum vísa, at gjaldførið hjá skipunum er sera trongt og vísast kann á, at "stuttfreistaða skuldin" (skuld, ið fellur til gjaldingar innanfyri 1 ár) er fleiri ferð so stór, sum áognin saman við tøka peninginum.

Verður sagt, at miðalrentuútreiðslurnar hjá skipunum seinastu árini hava verið áleið 1,2 mió kr., meðan avdráttirnir hava verið áleið 2,6 mió kr., kann gjaldførið lýsast sum víst í talvu 11 niðanfyri.

Talva 11. Gjaldførisúrslit 1999 - 2003

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Úrslit áðr. rentur og avskr. | 4.713 | 2.238 | 1.430 | 1.428 | -2.741 |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 |
| **Gjaldførisúrslit** | **913** | **-1.562** | **-2.370** | **-2.372** | **-6.541** |

# 7 Raksturin undir ymiskum fyritreytum

Við støði í tí tilfari nevndin hevur útvegað sær, eru gjørdar útrokningar fyri, hvussu raksturin broytist undir givnum fyritreytum. Til tess at gera samanlíkningar er raksturin hjá einum miðal rækjuskipi lagdur sum grund. Gerast kunnu nógvar hugsandi rakstrarloysnir, men nevndin hevur í fyrsta lagi valt at hyggja at teimum, sum hon metir eru mest sannlíkar, men eisini útrokningar fyri minni sannlíkar rakstrarloysnir eru settar upp.

Nevndin hevur valt at gera hesar útrokningar:

1. Skip, sum skipa raksturin eins og vanligt hevur verið seinastu nógvu árini.
2. Raksturin verður umlagdur til í størstan mun at fiska ídnaðarrækjur, umframt kvotuna undir Eysturgrønlandi.
3. Tvey skip býta núverandi kvotu í Eysturgrønlandi
4. Eitt skip fiskar alla kvotuna í Eysturgrønlandi

Nevndin hevur sett upp hugsaðu dømini, har eitt ella tvey skip fáa gagnnýtt alla kvotuna undir Eysturgrønlandi. Vísast skal í tí sambandi á, at rækjukvotunar í Eysturgrønlandi eru egnar kvotur. Tað er tí lítið sannlíkt, at eitt ella tvey skip fáa gagnnýtt kvotuna undir Eysturgrønlandi næstu eitt til tvey árini. Skal hetta verða møguligt, mugu feløgini sum hava kvoturnar avhenda hesar endaliga, ella má lógarbroyting fremjast, soleiðis at talið av skipum, sum hava hesa kvotu, verður avmarkað.

## 7.1 Vanlig veiðisamanseting

Við eini vanligari veiðisamanseting er útgangsstøðið tikið í hesum nøgdum og prísum:

Talva 12. Fyritreytir, vanlig veiðisamanseting

| | **Nøgd** | **Prísur** | **Søla** |
|---|---|---|---|
| Eysturgrønland | 115 | 30,00 | 3.450 |
| Aðrar leiðir | 1.885 | 10,00 | 18.850 |
| Íalt / miðalprísur | 2.000 | 11,15 | 22.300 |

Fyri vanliga veiðisamanseting eru sett upp 4 dømir:

1. Sannlíkt úrslit
2. Sannlíkt úrslit við hýruendurgjaldi
3. Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald
4. Prískrav til javnvág við hýruendurgjaldi

Talva 13. Úrslit fyri vanliga veiðisamanseting og prísur sum gevur javnvág

| | Sannlíkt úrslit | Sannlíkt úrslit Við hýru-endurgjaldi | Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald | Prískrav til javnvág við hýru-endurgjaldi |
|---|---|---|---|---|
| **Fyritreytir** | | | | |
| Hýruendurgjald | 0% | 28% | 0% | 28% |
| Miðalprísur | 11,00 | 11,00 | 15,00 | 13,50 |
| | | | | |
| **Rakstur** | | | | |
| Søluvirði | 22.250 | 22.250 | 30.250 | 27.250 |
| Hýra | -6.380 | -6.380 | -8.700 | -7.830 |
| Hýruendurgjald | 0 | 1.786 | 0 | 2.192 |
| Aðrar útreiðslur | -17.914 | -17.914 | -17.914 | -17.914 |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr.** | **-2.044** | **-258** | **3.636** | **3.698** |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| | | | | |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 | -4.500 | -4.500 | -4.500 |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | **-7.744** | **-5.958** | **-2.064** | **-2.002** |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| | | | | |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| **Gjaldføri** | **-5.844** | **-4.058** | **-164** | **-102** |

Útrokningarnar vísa, at tað er torført at fáa raksturin og gjaldførið at hanga saman. Mest sannlíka úrslitið er eitt hall áðrenn rentur og avskrivingar, sum er góðar 2 mió kr. Útrokningarnar vísa eitt gjaldførishall, sum er áleið 5,8 mió kr. Verður roknað við einum endurgjaldi, sum er 28 % av útgoldnu hýrunum, javnvigar úrslit áðrenn rentur og avskrivingar nøkulunda. Framvegis kann tó roknast við gjaldførishalli, sum er áleið 4 mió kr.

Útrokningarnar vísa somuleiðis, at skal gjaldførið javnviga, uttan at nøkur tiltøk verða sett í verk, má miðalprísurin á rækjum hækka við umleið fýra krónum.  Um ein skipan verður sett í verk, har skipini fáa 28 % av hýrunum endurgoldnar, skal prísurin á rækjum hækka við kr. 2,50 fyri at fáa gjaldførið at javnviga.

## 7.2 Umlagdur rakstur til ídnaðarrækjur og eina Eysturgrønlandskvotu

Tað hevur víst seg seinastu árini, at tað er nærum ómøguligt at fáa raksturin av rækjuskipunum at javnviga. Nevndin hevur tí sett upp eitt hugsað dømi, har tað í størstan mun verður lagt um til at veiða ídnaðarrækjur. Ein slík umlegging inniber, at tað er skjótari at fiska, og tí kunnu skipini økja samlaðu veiðuna. Hinvegin merkir hetta at miðalprísurin, sum skipini fáa fyri veiðuna lækkar, tí skipini ongar kókaðar rækjur selja. Fyritreytirnar, sum nýttar eru í hesum døminum, eru:

Talva 14. Fyritreytir ídnaðarrækjur

| | **Nøgd** | **Prísur** | **Søla** |
|---|---|---|---|
| Eysturgrønland | 115 | 30,00 | 3.450 |
| Aðrar leiðir | 2.285 | 8,00 | 18.280 |
| Íalt / miðalprísur | 2.400 | 9,05 | 21.730 |

Fyri dømið við umlagda rakstrinum eru vístar 4 útrokningar:

1. Sannlíkt úrslit
2. Sannlíkt úrslit við hýruendurgjaldi
3. Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald
4. Prískrav til javnvág við hýruendurgjaldi

Talva 15. Úrslit ídnaðarrækjur og prísur sum gevur javnvág

| | **Sannlíkt úrslit** | **Sannlíkt úrslit við hýru-endurgjaldi** | **Prískrav til javnvág uttan hýruendurgjald** | **Prískrav til javnvág við hýru-endurgjaldi** |
|---|---|---|---|---|
| **Fyritreytir** | | | | |
| Hýruendurgjald | 0% | 28% | 0% | 28% |
| Miðalprísur | 9,00 | 9,00 | 12,25 | 10,75 |
| **Rakstur** | | | | |
| Søluvirði | 21.600 | 21.600 | 29.400 | 25.800 |
| Hýra | -7.128 | -7.128 | -9.702 | -8.514 |
| Hýruendurgjald | 0 | 1.996 | 0 | 2.384 |
| Aðrar útreiðslur | -15.864 | -15.864 | -15.864 | -15.864 |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr.** | **-1.392** | **603** | **3.834** | **3.806** |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 | -4.500 | -4.500 | -4.500 |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | **-7.092** | **-5.097** | **-1.866** | **-1.894** |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 | -2.600 | -2.600 |
| | ----------- | ----------- | ----------- | ----------- |
| **Gjaldføri** | **-5.192** | **-3.197** | **34** | **6** |

Tað vísir seg, at fyri hetta hugsaða dømið er rakstrarúrslitið nakað frægari enn við vanligum rakstri. Staðfestast kann tó, at ein slík umlegging ikki er nøktandi. Mest sannlíka úrslitið er eitt hall áðrenn rentur og avskrivingar, sum er 1,4 mió kr. Roknast kann við einum gjaldførishalli, sum er áleið 5,2 mió kr. Verður roknað við einum endurgjaldi, sum er 28 % av útgoldnu hýrunum, kann roknast við einum avlopi áðrenn rentur og avskrivingar, sum er góðar 600 tkr. Hóast endurgjald, sum tilsvarar 28 % av útgoldnu hýrunum, verður talan um eitt gjaldførishall, sum er knappar 3,2 mió kr.

Fyri hetta dømið skal prísurin eisini hækka munandi fyri at fáa eitt nøktandi gjaldføri. Verða ongi tiltøk sett í verk, krevst nevniliga ein príshækking upp á góðar tríggjar krónur,

fyri at fáa eitt rímiligt gjaldføri. Hækkar prísurin kr. 3,25 fyri kg fæst eitt úrslit, sum er 3,8 mió kr. áðrenn rentur og avskrivingar. Við hesum javnvigar gjaldførið.

Um ein endurgjaldsskipan, har 28 % av hýrunum verða endurgoldnar, verður sett í verk, er neyðugt, at prísurin hækkar kr. 1,75, fyri at fáa gjaldførið at javnviga.

## 7.3 Tvey skip undir Eysturgrønlandi

Eitt dømi er sett upp, sum er grundað á eina støðu, har ongi tiltøk verða sett í verk. Um roknað verður við, at tvey skip fáa atgongd til og gagnnýta veiðimøguleikarnar í Eysturgrønlandi, og restina av árinum troyta aðrar møguleikar, er komið til rakstrarúrslitini, sum víst í talvu 16 niðanfyri. Nýttar verða tvær ymiskar veiðisamansetingar. Ein har skipini hava vanliga veiðisamanseting og ein, har lagt verður um til ídnaðarrækjur.

Við vanligum rakstri verður roknað við eini veiðu upp á 1.600 tons. Roknað verður við, at hvørt skip fiskar 575 tons í Eysturgrønlandi og at restina av árinum kann hvørt skip fiska góð 1.000 tons á øðrum leiðum, um raksturin verður skipaður eins og vanligt hevur verið. Verður lagt um til ídnaðarrækjur, er roknað við at samlaða veiðan verður 1.900 tons. 575 tons undan Eysturgrønlandi og restina á øðrum leiðum.

Talva 16. Úrslit um tvey skip fiska Eysturgrønlandskvotuna

| | **Vanlig veiðisamanseting** | **Ídnaðarrækjur** |
|---|---:|---:|
| **Rakstur** | | |
| Søluvirði | 27.520 | 27.930 |
| Hýra | -7.981 | -9.217 |
| Aðrar útreiðslur | -19.164 | -17.364 |
| | ----------- | ----------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr.** | **375** | **1.349** |
| | ----------- | ----------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 | -4.500 |
| | ----------- | ----------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | **-5.325** | **-4.351** |
| | ----------- | ----------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 | -2.600 |
| | ----------- | ----------- |
| **Gjaldføri** | **-3.425** | **-2.451** |

Viðmerkjast skal, at tað hevur verið trupult at fingið nóg gott talgrundarlag fyri slíkan rakstur. Reiðarar vísa á, at um roynt verður nógv undir Eysturgrønlandi, hækka viðlíkahalds – og reiðskapskostnaðirnir, men sum nevnt, er torført at fáa staðfest, hvussu stór økingin er. Út frá teimum upplýsingum nevndin hevur fingið, er sett upp eitt hugsað dømi um slíkan rakstur, men tølini mugu takast við fyrivarni.

Í útrokningunum eru viðlíkahalds – og reiðskapskostnaðirnir hækkaðir við 750 tkr. fyri hvønn av hesum kostnaðum. Við hesum fyritreytum vísa útrokningarnar, at úrslit áðrenn rentur og avskrivingar er 375 tkr. í vinningi. Skipini kunnu harvið gjalda ein lítlan part av rentunum, men ongar avdráttir. Samlaða úrslitið er eitt gjaldførishall upp á 3,4 mió kr.

Fyri dømið, tá skipini restina av árinum bert veiða ídnarrækjur, er úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar 1,35 mió kr. í vinningi. Skipini kunnu sostatt gjalda renturnar, men onki er til avdráttir. Roknað verður við einum gjaldførishalli, sum er 2,4 mió kr.

## 7.4 Eitt skip undir Eysturgrønlandi

Somuleiðis er sett upp eitt hugsað dømi, har ein rækjubátur fær rættin til alla Eysturgrønlandskvotuna. Inntøkan er mett út frá, at roknað verður við einum prísi, sum er 30 kr./kg. Av tí, at nevndin ikki hevur nakað talgrundarlag fyri rækjuskip, sum hava roynt alt árið undir Eysturgrønlandi, hevur tað hinvegin verið sera trupult at ásett útreiðslurnar. Útreiðslurnar eru ásettar eftir ráðføring við reiðarar. Út frá teirra ábendingum eru hesar útreiðslur ásettar, men tølini mugu takast við størsta fyrivarni.

Av tí, at roknað er við munandi minni veiðu enn tað sum er vanligt hjá einum rækjuskipi í vanligum rakstri, eru kostnaðirnir til landingar- og flutningsútreiðslur lækkaðir. Viðmerkjast skal eisini, at inntøkan er mett út frá at fiskað verða 1.000 tons. Tølini eru sett upp í talvu 17.

Klárar eitt rækjuskip hinvegin at fiska alla kvotuna, broytast rakstrartølini munandi til tað betra. Samlaða inntøkan økist við 4,5 mió kr. Mett verður, at úrslitið batnar 2 - 3 mió kr.

Talva 17. Úrslit um eitt skip fiskar 1.000 tons við Eysturgrønland

| | |
|---|---|
| **Rakstur** | |
| Søluvirði | 30.000 |
| Hýra | -8.700 |
| Aðrar útreiðslur | -19.664 |
| | ----------- |
| **Úrslit áðrenn rentur og avskr** | 1.636 |
| | ----------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 |
| Avskrivingar | -4.500 |
| | ----------- |
| **Úrslit áðrenn óvanligt og skatt** | -4.064 |
| | ----------- |
| Rentuútreiðslur | -1.200 |
| Avdráttir | -2.600 |
| | ----------- |
| **Gjaldføri** | -2.164 |

Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar er eitt avlop upp á 1,6 mió kr. Raksturin ber tí allan rentukostnaðin og ein lítlan part av avdráttunum. Samlaða úrslitið er eitt gjaldførishall upp á 2,1 mió kr.

# 8 Hýrur / hýruprosent

Nevndin hevur eisini viðgjørt hýrurnar hjá rækjuflotanum. Hagtøl vísa, at inntøkurnar hjá manningunum á rækjuflotanum eru tær lægstu í føroyska fiskiflotanum. Hetta **kann** broytast, um talan verður um, at tað við munandi minni manningartali kann veiðast sama virði. Skuldi tað hent, kundi verið viðgjørdur tann møguleiki, at tann hækking í hýrunum, sum liggur í lægri manningartali, verður býtt øðrvísi enn í dag, so hetta kundi verið eitt íkast til, at flotin yvirlivir.

Men hetta er alt treytað av samráðingum millum avvarðandi feløg. Nevndin hevur tí ikki viðgjørt hetta neyvari í sínari lýsing av støðuni og hevur ikki tikið hendan møguleika við í sínar metingar.